# Judo í 40 ár

Leygardagin heldur judoítrótturin í Føroyum 100 ára føðingardag.

1. Mars vóru liðin 40 ár, síðani Havnar Judofelag varð sett á stovn sum fyrsta judofelag í Føroyum. 10 ár seinni, ella 31. Mars 1981 varð Sunda Judofelag sett á stovn, og 28. Februar 1981 varð Judosamband Føroya stovnað. Hesi bæði seinnu hava sostatt 30 ára stovningar dag í ár, og samanlagt verður tað tí til 100 ára hald.

Umframt tey í dag virknu judofeløgini í Havn og í Sundalagnum, so varð judofelag stovnað í Klaksvík í 1970-unum, men hetta felagið gavst seinast í 90-unum, eftir at serliga fráflyting av teimum leiðandi persónunum í felagnum gjørdi tilveruna hjá hesum felag heldur trupla.

Í 1981 vóru eisini judofeløg stovnað vesturi í Vágum og suðuri í Vági, men hesi bæði vóru bert virkin í fá ár. Seinni var eisini felag stovnað í Kollafirði, men heldur ikki tað yvirlivdi.

Gongdin hjá judoítrótti í Føroyum hevur verið skiftandi. Judo hevur verið fyri einari spakuligari framgongd frá stovnan og heilt fram til fyrst í 90-unum, tá tann ógvusliga fráflytingin úr Føroyum eisini setti síni spor her, tí fleiri av virknu judofólkunum fluttu av landinum.

Judo var partur av Oyggjaleikunum frá 1989 fram til og við leikirnar í Gibraltar í 1995. Tá tað har varð kunngjørt, at judo ikki fór at vera partur av leikunum á Jersey í 1997, var hetta eitt stórt skot fyri bógvin á judoítróttinum, sum merkti stóra frágongd av teimum vaksnu íðkandi.

Millum børn og ung hevur judo altíð verið ein væl umtókt ítróttagrein, og seinnu árini hevur aftur verið framgongd millum tey vaksnu. At judo so aftur kom inn í Oyggjaleikirnar í 2007 og 2009 hevur havt stóra positiva ávirkan, og tí er tað sera hugstoytt, at judo ikki verður á leikunum nú í summar.

Men Judosambandið arbeiðir framhaldandi við at menna ítróttargreinina og skapa henni nýggjar avbjóðingar í staðin fyri Oyggjaleikirnar. Teknískt hevur ítrótturin verið fyri stórari menning, og fyri góðum ári síðani tóku fyrstu judoíðkararnir svarta belti í Føroyum. Tey, ið áður hava tikið svart belti, hava gjørt tað uttanlands.


Savnsmynd

Eisini verður arbeitt við at stovna nýggj judofeløg, so man fær breitt ítróttin enn meira kring landið. At áhugin er til staðar síggja vit við at fleiri av limunum ferðast langt fyri at venja á Oyrarbakka og í Havn.

Í samband við føðingardagnin hjá Judosambandinum, Havnar- og Sunda Judofelag verður almenn móttøka í ÍSF-húsinum leygardagin frá kl. 18 til 20, har øll eru hjartaliga vælkomin!





## Vágamenn í Smiðjuni

Frá hósdegnum 10. mars til týsdagin 15. mars 2011 hava Finnbjørn Hansen úr Sandavági og Torfinn Jacobsen úr Miðvági framsýning av akrylmálningum, pastellum og fotokollasjum í Smiðjuni í Lítluvík

Finnbjørn Hansen er sjálvlærdur og hevur málað síðani 1982. Hann hevur havt framsýning í Smiðjuni í Lítluvík nakrar ferðir, og hevur annars verið við á ymsum framsýningum kring landið.

Torfinn Jacobsen hevur málað í nøkur ár. Hann hevur luttikið á ymsum skeiðum, einamest hjá Pól Skarðenni, listamanni. Hann hevur verið við á Ólavsøkuframsýningini í Listaskálanum í 2009 og 2010, men hetta er fyrsta sjálvstøðuga framsýningin hjá honum.

Á hesari framsýningini hevur Torfinn 15 akrylmálningar, meðan Finnbjørn hevur 15 pastellir og 6 fotokollasjur.

Framsýningin letur upp hósdagin klokkan 16. Opið er allar dagar frá klokkan 16 til 20. Leygardagin og sunnudagin tó frá klokkan 14 til 20.

## Í MORGIN

4/7 °C




Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum -2 og +1 stig.

## FRÍGGJADAGIN

2/5 °C




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin snarar hann í landnyrðing. Sólglottar, men kanska okkurt kavaælið. Hitalagið millum -3 stig og frostmarkið.

## LEYGARDAGIN

1/4 °C




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi upp í hvassan vind av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið um frostmarkið.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Sunnudagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar og hitin um frostmarkið. Mánadagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Hitin millum 3 og 6 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 996 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer eystureftir, sunnan fyri Føroyar.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer eystureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 132 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

4. mars Tendring
6. mars Mánin longst frá jørðini
12. mars Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. mars | 09:26 | 21:46 | 08:26 | 20:46 | 08:41 | 21:01 | 11:26 | 23:46 | 00:07 | 12:26 | 07:41 | 20:01 | 06:41 | 19:01 | 09:41 | 22:01 | 10:41 | 23:01 | 09:11 | 21:31 | 10:26 | 22:46 |
| 10. mars | 10:08 | 22:30 | 09:08 | 21:30 | 09:23 | 21:45 | - | 12:08 | 00:46 | 13:08 | 08:23 | 20:45 | 07:23 | 19:45 | 10:23 | 22:45 | 11:23 | 23:45 | 09:53 | 22:15 | 11:08 | 23:30 |
| 11. mars | 10:53 | 23:17 | 09:53 | 22:17 | 10:08 | 22:32 | 00:30 | 12:53 | 01:30 | 13:53 | 09:08 | 21:32 | 08:08 | 20:32 | 11:08 | 23:32 | - | 12:08 | 10:38 | 23:02 | 11:53 | - |
| 12. mars | 11:54- | 10:54 | 23:31 | 11:09 | 23:46 | 01:17 | 13:54 | 02:17 | 14:54 | 10:09 | 22:46 | 09:09 | 21:46 | - | 12:09 | 00:32 | 13:09 | 11:39 | - | 00:17 | 12:54 | |
| 13. mars | 00:31 | 13:09 | - | 12:09 | - | 12:24 | 02:31 | 15:09 | 03:31 | 16:09 | 11:24 | - | 10:24 | 23:03 | 00:46 | 13:24 | 01:46 | 14:24 | 00:16 | 12:54 | 01:31 | 14:09 |